

## Okkara kokkar - Sending nr. 5

*Hesaferð: Joen Peter og Sigrún Nolsøe, hárfríðkanarkvinna.*
*Skrá: Toskur bakaður í ovni við tomatsós, piparfrukt og fennikel*
*Ræstur fiskur á ein øðrvísi hátt*

**Uppskriftir:**
Toskaflak — hetta skalt tú brúka:

600 gr. av toskaflaki
4 spsk. av dijonsinnoppi

**Tomatsós — hetta skalt tú brúka:**
1 leyk
1 fennikel
4 sólturkaðar tomatir
3 piparfruktir — reyða, gula og grøna
5 spsk. av olivenolju
1 ds. av flustum tomatum
1 hvítleyksbát
12 grøn oliven
Salt og pipar
Karvaða persillu

1. Sker fiskin í smá stykkir og legg hann í eitt eldfast fat
2. Smyr sinnopp á stykkini og set í ovnin í 8 min. á 200 stigum.
3. Karva leyk, karva fennikel, sker sólturkaðu tomatirnar í álir og sker piparfruktirnar í terningar.
4. Steik alt hetta í grýtu við olivenolju í uml. 5 min.
5. Koyr síðani flustu tomatirnar og hvítleykin í og lat kóka í uml. 5 min.

6. Borðreið við antin rísi ella pasta.

**Ræstur fiskur — hetta skalt tú brúka:**

8 ræstar fiskar
3 tomatir
300 gr. av piparfrukt
2 hvítleyksbátar
1-2 leykir
400 gr. av rísi
100 gr. av mozarellaosti

Soleiðis gert tú:

1. Kóka fiskin við eitt sindur av olju í uml. 10-15 min.
2. Skrædla fiskin og legg hann í eitt eldfast fat
3. Steik leyk, piparfrukt, hvítleyk og tomatir á einari pannu í uml. 5 min. krydda við salti og pipari.
4. Stroy ost omaná og set fatið í ovnin í uml. 10-15 min.
5. Borðreið antin við rísi ella pasta.

# Íløgufeløg hava ein sera avgerandi leiklut

Ólavur í Beiti

– Um tað eydnast at byggja upp ein vælvirkandi, føroyskan, skipaðan partabrævamarknað, verður í størri mun møguligt hjá íleggjarum at seta pening í partabrøv sum stuttfreistaða íløgu, uttan at váðin gerst lutfalsliga stórur. Ein vælvirkandi partabrævamarknaður er eyðkendur við stórum handli við partabrøvum, og merkir hetta, at lættari verður hjá partabrævaseljarum at finna keyparar til partabrøvini.

– Møguleikar fyri at gera kollektivar íløgur í partabrøv gjøgnum íløgufeløg virka eisini fyri, at íløgur í partabrøv í størri mun kunnu roknast sum styttri plaseringar, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri m.a. í viðmerkingunum til uppskot um íløgufeløg.

Og víðari sigur fíggjarmálaráðharrin, at íløgufeløg kunnu allýsast sum feløg, ið frá einum størri skara av privatpersónum, fyritøkum og øðrum taka ímóti peningi til at gera íløgur í virðisbrøv, mest børsnoterað, við eini grundreglu um váðaspjaðing. Felagsformurin tryggjar, at íleggjast kann í vandamerkt pappír uttan at váðin hjá tí einstaka liminum í felagnum økist.

### Passivir eigarar

– Limirnir í donsku íløgufeløgunum eru ofta smáspararar, men seinnu árini hava stórir íleggjarar í størri og størri mun eisini víst áhuga. Hesir eru td. tryggingarfyritøkur og eftirlønargrunnar, sum við ávísum deildum hjá íløgufeløgunum kunna fara inn á íløguøki, har teir ikki sjálvir hava neyðuga servitan.

– Harumframt er lætt og skjótt at koma inn og fara út sum limur, tí felagið hevur skyldu til beinanvegin at loysa út prógvið, tá ein limur biður um tað. Hesi viðurskifti hava týdning fyri smáspararan, tí einsamallur kann hann langt frá fáa somu váðaspjaðing. Eisini er tað dýrari hjá honum í gjøldum sjálvur at fremja íløgurnar, og tað kann lættliga koma at taka langa tíð at selja partabrøvini, um hann hevur tey sjálvur.

– Íløgufeløg eru vanliga passivir eigarar í fyritøkum, samstundis sum framtaksfeløg oftast ynskja beinleiðis ávirkan á fyritøkuna, sum íløga er gjørd í. Her er talan um slag av íleggjarum, sum kunna hava stóran týdning fyri at fáa ein partabrævamarknaða í Føroyum at virka, sigur Karsten Hansen.

Fíggjarmálaráðharrin kunnar eisini um, at uppskotið er gjørt í samarbeiði við umboð fyri Landsbankan, Føroya Banka og Føroya Sparikassa.

# Tilmæli um menningarmøguleikarnar hjá fiskivinnuni

Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum, verður greitt frá, at Undirvísingar og Mentamálastýrið setti á vári 1999 ein arbeiðsbólk at útgreina hvønn tørv fiski- og alivinnan hevði av fólki við útbúgving. Bólkurin handaði í apríl 1999 “Frágreiðing um førleikaviðurskifti og útbúgvingartørv í føroyskari fiskivinnu”. Henda frágreiðingin skal nú verða grundarlagið undir víðari viðger av spurninginum um, hvussu føroyingar skulu menna skúlaskap á hesum øki.

Landsstýrismaðurin í útbúgvingar- og mentamálum hevur í samstarvi við landsstýrismonnunum í fiskivinnu- og vinnumálum, sett eina felags nevnd at koma við einum tilmæli um, hvussu skipast kann fyri einum *felags stovni*, hvørs fremsta endamál er at menna fiskivinnuna á sjógvi og á landi. Hesin stovnur skal veita vinnuni ávísar tænastur og standa fyri teimum útbúgvingum, ið vinnan hevur tørv á. Endamálið er at knýta útbúgvingarnar innan fiskivinnu og havbúna til ein menningardepil, har útbúgvingarnar kunnu virka saman við øðrum tænastum, ið tengdar eru at vinnuni.

### Menningardepil

Arbeiðsetningurin hjá nevndini er, at koma við einum uppskoti um ein útbúgvingar- og menningardepil, har undirvísing og menningarvirksemi innan fiskivinnuna eru savnað í eina eind, undirvísingin í stóran mun byggir á verkligt grundarlag, eisini gjøgnum skeiðsvirksemi, ein tænasta er á deplinum, ið vinnulívið ger støðuga nýtslu av, t.d. starvsstovur, samstarv við aðrar útbúgvingar, gransking og stovnar innan sama øki, bæði heima og uttanlands, útbúgvingarstovnurin og vinnan nýta servitan og útgerð hjá hvørjum øðrum, gingið verður á odda í menningartiltøkum í fiskivinnuni og leiðslubygnaðurin er skipaður soleiðis at áhugabólkarnir innan vinnuna kunnu gera seg galdandi.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið er av teirri áskoðan, at fiskivinnuútbúgvingar eiga at vera sæddar í so breiðum samanhangi sum møguligt. Mett verður, at nú er tann stundin komin, at umboð fyri vinnuna saman við øðrum áhugaðum pørtum taka støðu til menningarmøguleikarnar hjá høvuðsvinnuni í útbúgvingarhøpi og gera sítt tilmæli.

### 1. desember í ár

Í nevndini sita: Guðrið Andorsdóttir, Føroya Fiskavirking — formaður, Hans Andreas Dam Joensen, Undirvísingar- og Mentamálastýrið, Regin Jacobsen, Bakkafrost, Rógvi Reinert, Faroe Seafood, Jákup Andreasen, Fiskivinnuskúlin, Heðin Joensen, Fiskimálastýrið, Johanna Vang, Kósin Seafood, Marita V. Rasmussen, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Óli Jacobsen, Føroya Fiskimannafelag, Jákup Sólstein, Føroya Reiðarafelag, Ingeborg Winther, Føroya Arbeiðarafelag, Bárður Enni, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Súni Poulsen, Menningarstovan, Maria Róin, Vinnumálastýrið, Hjalti í Jákupsstovu. Fiskirannsóknarstovuna og Hans Pauli Joensen, Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya.

Álitið frá nevndini skal handast landsstýrismanninum í seinasta lagi 1. desember 2000.

## Viðmerking:

# Góða Eydnu, Anfinn og felagir

“Nú er tann styndin kkomin til handa”, yrkti Jóannes bóndi á sinni. Tað kann endurtakast nú tit eru á ferð til Danmarkar at samráðast um nýggju ríkisskipan okkara.

Væl at vita at málið verður ikki avgreitt á einum fundi, men í morgin verður spónurin settur í greytin. Upprit tykkara verður lagt fram, og frá nú av til móti sumri verður samráðst, og vónandi liggur greitt áðrenn longsta dag.

Tað eru skjótt tvey ár síðani tit fóru undir megnar verkið at evna til eina nýggja frælsis- og sjálvbjargnisskipan fyri land okkara. Tit hava ikki ligið á løtu síðani, men málrættað arbeitt við tí uppskoti, sum nú er førningur tykkara á ferðini til hitt landið, sum vit á javnbjóðis føti skulu arbeiða saman við. Politiskt illverður hevur kanska onkuntíð verið og eitt sindur sjabbut innanboða, og onkrir hvessingar úr øðrum flokkum hava roynt tað teir vóru mentir at órógva siglingina og fáa skipið av kós. Men tit hava higartil klárað at siglt teinin og fara nú einsamallir á skipi inn í havnina, har menn skulu royna sítt avgerandi kynstur.

Rúgvismikið arbeiði og tilfar liggur eftir tykkum. Uppskot í tinginum, upplýsingar av ymiskum slagi, hvítabók og mangt annað er ávegis lagt fyri Føroya fólk. Við spenningi bíðaðu mong av okkum eftir seinasta uppritinum, sum lagt varð fyri uttanlandsnevndina. Tað varð kunngjørt fyri nøkrum døgum síðani og vísti seg at vera eitt væla verk. Samgonguflokkarnir tóku undir við tí, Miðflokkuni var ikki avvísandi, men hinir báðir flokkarnir, sum mest hava sýnt hvessingalyndi, royndu til tað seinasta at loypa øði í grindina. Men ússaligar vóru viðmerkingar teirra. Ongar veruligar grundgevingar, bert orðini um, at teir vóru ímóti at farið var til samráðingar. Ein situr tí eftir við eini kenslu av, at hesir flokkar ongan vilja hava at arbeiða fyri eini loysn av hesum týdningarmikla máli.

Tit arbeiða fyri eini góðari søk. Tit hava eitt gott grundarlag at byggja á. Tit eru væl fyrireikað, og vit eru mong, sum ynskja alt tað besta fyri tykkum við vón um eitt gott úrslit til



frama fyri alt Føroya fólk, eisini fyri tey, sum í dag eru í móti.

**Góða eydnu.**
**Jógvan Sudstein**



# Aftur átta miliiónir í avlopi

*Føroya Fiskasøla hevði aftur í fjør eitt gott ár við einum rakstraravlopið upp á meiri enn 8 milliónir og við tí avlopinum eru hallini tey trý fyrstu árini vunnin inn aftur. Eginognin er nú størri enn upprunaligi partapeningurin og stjórin, Hans Johannes á Brúgv er sjálvandi væl nøgdur við avrikið, men tað kann gerast torført at varðveita hesa gongdina, sigur hann*



*Annað árið á rað hevði Fiskasølan eitt rakstraravlop upp á meiri enn átta milliónir krónur og við tí er eginpeningurin fyri fyrtu ferð hægri enn tær 50 mió. krónurnar, sum partapeningurin er* **savnsmynd**

Sveinur Tróndarson

Roknskapurin hjá Føroya Fiskasølu varð almannakunngjørdur í vikuni og enn einaferð kundi leiðslan á Fiskasøluni vísa eitt gott úrslit.

Avlopið av vanliga rakstrinum var góðar 8,4 mió. krónur og tað er tað sama, sum tað var í 1998.

Tá var samanlagda ársúrslitið merkt av at Fiskasølan hevði selt bygningin yviri við Strond, verður sæð burtur frá teimum inntøkunum, so var úrslitið tá eins og nú um 8,4 mió. krónurnar.

### Høg renta

Tað er ikki so langt síðani, at Fiskasølan var í so svárari neyð, at henni nýttist andahjálp.

Fyrstu trý árini eftir umskipanina var úrslitið heldur einki at reypa av, men nú er av álvara farið at ganga hinvegin.

Tað, sum tey trý fyrstu árini var mist er vunnið innaftur og fyri fyrstu ferð, síðani umskipanina er eginognin størri enn partapeningurin.

Úrslitið í fjør er tað sama sum at eginpeningurin við ársbyrjan 1999 hevur fingið eina rentutilskriving upp á góð 13 prosent, og tað er stjórin Hans Johannes á Brúgv, serstakliga væl nøgdur við.

– Tað er væl hægri enn nakar peningastovnur kann veita, sigur hann.

Og tað gevur eigarin Framtaksgrunnur Føroya uttan iva stjóranum rætt í.

### Marknaðurin uppi ígjøgnum

Orsøkin til góðu úrslitini hjá Fiskasøluni seinastu tvey árini skal sjálvandi síggjast í tí samanhangi, at marknaðartreytirnar hava verið fiskasølunum til vildar. Hetta er stjórin fullgreiður yvir.

– Tað er eingin loyna, at prísurin hevur verið uppi ígjøgnum. Bæði í rávøruliðnum og eisini á marknaðinum úti í heimi. Toskafiskiskapurin í Barentshavinum hevur verið minkandi og tað trýstir prísin uppeftir, sigur Hans Johannes á Brúgv, stjóri.

Samstundis var eftirspurningurin eftir lidnum vørum størri enn hann hevur verið áður og tað hevði so við sær, at ein enn minni partur fór óvirkaður av landinum.

Ein triðja orsøk var so, at nøgdin av eitt nú Alaska pollock, sum kappast við føroyska upsan, fall í fjør og tað hevði við sær, at prísurin á upsa eisini hækkaði.

Hetta vóru nakrar av orsøkunum til góða úrslitið hjá Fiskasøluni og fiskaseljarum yvirhøvur, men samstundis er hetta nakað, sum kann vera orsøkin til, at útlitini fyri 2000 ikki eru so góð.

### Væntar prísfall

Hans Johannes á Brúgv sigur, at hann ikki væntar sama góða úrslit fyri næsta ár, nevniliga av teirri orsøk, at prísirnir longu eru upp í gjøgnum.

– Eg veit væl, at eg segði tað sama í fjør, men fyri tað hava prísirnir hildið sær. Tað eru ymsar orsøkir til tað, men eg dugi ikki at síggja, at tað framhaldandi kann halda sær har uppi. Eg skal kortini ikki sita og spáa at tað fer at ganga illa, men eg rokni við, at fiskivinnan fer at hava tað truplari enn hon hevur havt tað tey seinastu tvey árini. Tey hava nevniliga verið serstakliga góð, sigur Hans Johannes.

Og so er ein spurningur, um føroyska fiskivinnan er før fyri at taka eina aftur-gongd.

Taka vit Fiskasøluna, so er hon væl fyri, tí eginpeningurin er rættiliga stórur í mun til samlaðu skuldina við árslok 1999.

# Fiskasølurnar undirgrava hvørja aðra

*Hans Johannes á Brúgv, stjóri á Fiskasøluni sigur, at søluhátturin hjá teimum nógvu fiskasølunum kring landið kann enda við at undirgrava føroysku fiskivinnuna. – Kunnleikin til sølu og marknaðin er ikki nóg góður, sigur hann*

Sveinur Tróndarson

Tað er nógv broytt í føroyska fiskasøluheiminum tey seinastu nógvu árini.

Fyrr var tað sum við sjónvarpinum - bara tann eina rásin at hyggja at, men tíðin hevur lagað tað soleiðis, at nú er ríkiligt at velja ímillum.

Trupulleikin er so bara at velja rætt, og tað er ikki altíð so lætt.

Lesa vit ársfrágreiðingina hjá stjóranum á Fiskasøluni um føroyskar fiskaseljarar, so er hon ikki ólík søguni um sjónvarpsrásirnar.

– Trupulleikin er ikki beinleiðis at tað eru so nógvar fiskasølur, men tað er meira mátin, sum tað verður selt uppá, sum eg havi at, sigur Hans Johannes á Brúgv.

### Nýtt og ókent

Hans Johannes leggur beinanvegin dent á, at hann ikki sigur hetta, tí at hann sjálvur vil sleppa at selja fiskin, men tí, at tær fyritøkur, sum Fiskasølan kappast við, ikki hugsa seg nóg væl um, tá tær fara út á marknaðin.

– Fyri mær sær tað út, sum tær gloyma at rokna vinningin upp í prísin og tað hevur við sær, at føroyskur fiskur verður seldur fyri undirprís, sigur hann.

Hans Johannes greiðir frá, at nógvir av teirra rávøruveitarum nú sjálvir hava søludeildir, men at hesar søludeildir hava ikki tann neyðuga marknaðarkunnleikan við í teirra dagliga arbeiði.

– Taka vit prísin sum dømi, so má munur gerast á, um tú selur til eina heilsølu ella til ein endabrúkara, tí annars trýsta vit sjálvir prísin niðureftir, og tað gongur út yvir okkum sjálvi. Hugsa tær, um kundin vil gjalda 60 krónur og vit, tá vit selja beinleiðis til hansara selja tað fyri 30 krónur. Tað fer at hava við sær, at kundin framyvir ikki vil keypa vøruna fyri meiri enn 30 krónur. Tað sigur seg sjálvt. Hetta er serstakliga óheppið og kortini er tað nakað, sum vit vita hendir javnan, sigur stjórin á størstu fiskasøluni í landinum.

Orsøkina sigur hann vera manglandi kunnleiki til marknaðin og manglandi tilvitan til samlaða úrslitið.

– Fyri mær sær tað út til, at seljararnir í ávísum førum bara fara eftir besta prísinum ta løtuna, og teir hugsa ikki um, at tað teir gera kann enda við at skaða føroysku fiskivinnuna meir enn tað gagnar, sigur Hans Johannes á Brúgv.

### Nógvir seljarar

Talið av fiskasølum her á landi er økt sera nógv seinnu árini, men kundarnir úti á heimsmarknaðinum eru í roynd og veru teir somu, og teir eru ikki býttari enn so, at fáa teir ein prís frá einum føroyskum seljara, so kunnu teir ringja til aðrar og á tann hátt trýsta prísin niðureftir.

– Hesum vilja vit gjarna sleppa undan, tí úrslitið er minni avkast. Og allar fiskasølur eiga at gera alt fyri at sleppa undan tí. Vit hava merkt at jú nærri vit eru marknaðinum betri gongur, og tað sæst m. a. við, at uml. 65 prosent av umsetninginum verður selt av dótturfeløgum, sigur hann.

SANGKAPPING

**Skriva ein góðan sang...**
**...og vinn 10.000 krónur!**

Goymir tú eitt lítið tónaskald ella ein spírandi yrkjara innan í tær, er henda sangkappingin uttan iva júst nakað fyri teg!

Øll eru vælkomin at senda inn sangir og løg til sangkappingina, sum er útskrivað í sambandi við fløguútgávu við føroyskum sangarum og tónleikarum.

**Sangkappingin og fløguútgávan eru partur av einum størri tiltaki, sum hevur til endamáls at gera vart við umstøðurnar hjá brekaðum í Føroyum og teirra avvarðandi.**

Hav hetta í huga, tá tú skrivar tín sang ella gert títt lag til kappingina!

Virðislønir verða latnar trimum teimum bestu í kappingini, og er ein dómsnevnd sett at velja hesi millum øll tey innkomnu uppskotini.

Virðislønirnar eru ávikavist 10.000, 5.000 og 3.000 krónur, so tað loysir seg at gera eina roynd...

Vilt tú hava meira at vita, kanst tú vitja heimasíðuna
http://sangkapping.cjb.net
ella senda eitt teldubræv til
sangkapping@sangkapping.cjb.net.

Ikki er neyðugt hjá tær at gera eina studio-upptøku, men send bara eitt kassettuband við sanginum á einfaldasta hátt, t.d. sangur/guitar ella sangur/klaver.

Freistin at lata sangir inn til kappingina er ***31. mars 2000***, og sangir og løg skulu sendast til:

**Vælskapt Brek**
**Postboks 2208**
**FO-165 Argir**

SANSIR · TEL 355 355